Álit

í

løgtingsmáli nr. 79/2023: Uppskot til løgtingslóg um heildarætlan fyri Kjarnuna

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 19. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Klintra, KT-felagið, løgmann, Aksel V. Johannesen, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Øll skipanin kring skattainnkrevjing í Føroyum byggir á tøkni frá 1980unum, og tað hevur í fleiri ár verið víst á, at tað er neyðugt at skifta skipanina út. Bæði tí hon er stirvin at umsita, men eisini tí hon byggir á tøkni, sum sera fá eftir hondini hava innlit í.

Á fíggjarlógini fyri 2024 er verulig játtan á fyrsta sinni sett av til nútímansgerð av skattaskipanini, so vit ikki brádliga ein dag standa við einari skattaskipan, sum ikki riggar. Hetta uppskotið er materiella heimildin til arbeiðið, sum ætlandi skal ganga fram til 2029 og er býtt sundur í 35 partar, harav summir hanga meira saman enn aðrir. Samlað er lagt upp til at heimila upp til 150 mió. kr. Av hesum eru umleið 100 mió. kr. metti samlaði kostnaðurin í dagsins prísum og smáar 19 mió. kr. eru mettur prísvøkstur. Sostatt eru væntaðu útreiðslurnar smáar 119 mió. kr. fyri framtíðartryggingina, meðan tað hartil verður biðið um góðar 31 mió. kr. til eitt váðaískoyti.

Undir viðgerðini av málinum hava serliga tríggir spurningar fylt nógv. Tað er (1) um talan er um rættan arbeiðsháttat gera eina so víðfevnda verkætlan, (2) er nóg stórur partur av verkætlanini boðin út og (3) um tann parturin, sum varð boðin út, er rætt boðin út.

1. Viðvíkjandi arbeiðsháttinum eru serliga tvey viðurskifti, sum hava verið umrødd.

Tað fyrra er, um tað er rætt til brúkaraflatuna (front-end) at forrita við ”OutSystems”, sum er ein ávísur máti at byggja sjálva skipanina upp, ið eisini varð brúktur til Talgildu Føroyar. TAKS hevur fyri nevndini greitt frá, at hesin háttur ger tað munandi lættari at greiða frá, hvørji ynskini til skipanina

eru, umframt at tað er lættari at fylgja við, hvussu arbeiðið gongur. TAKS hevur somuleiðis kunnað um, at hesin háttur er viðmældur frá uttanhýsis ráðgeving, sum TAKS hevur brúkt til hetta málið. Aðrir partar hava víst á, at hetta er ein arbeiðsháttur, sum ikki er serliga útbreiddur í Evropa, og at hesin háttur er uppbýttur soleiðis, at tað er torført at kanna aftaná, hvat veruliga gongur fyri seg inni í skipanini.

Meirilutin staðfestir, at TAKS, sum skal brúka skipanina, hevur best fortreytir at taka støðu til, hvør arbeiðsháttur sannlíkt fer at hava best úrslit við sær.

Tað seinna er, at tað á fakmáli verður brúktur "agilur" arbeiðsháttur, sum merkir, at verkætlanin í veruleikanum ikki er projekterað, áðrenn arbeiðið byrjar, men at partarnir út frá einari meting um tíðarnýtslu til hvørja verkætlan byrja frá einum enda við tí týdningarmesta. Millum annað merkir hetta ítøkiliga, at fólkini, sum arbeiða við verkætlanini, sita saman við teimum, sum skulu brúka hana, tá hon er liðug. Hetta ger, at brúkarin er nærri sjálvari menningini, og tí hevur betri møguleika at gera rættingar á vegnum, og at mennarar og brúkarar hava verið við at finna fram til valdu loysnirnar. Vansin er, at tað tá ikki frammanundan er heilt greitt, hvat ymisku partarnir fara í gongd við, og hvat ætlaða endaliga úrslitið er.

TAKS hevur víst á, at tey kenna seg trygg við hesum arbeiðshátti, tí talan ikki er um at gera nakað heilt nýtt, men at gera eina betri og meira modernaða útgávu av tí, sum TAKS longu brúkar hvønn dag.

2. Viðvíkjandi pørtunum, sum als ikki hava verið bodnir út, er greitt, at TAKS frá byrjan hevur mett Elektron at vera best skikkað til at taka sær av partinum, sum snýr seg um sjálva skattaútrokningina og líknandi (back-end). Argumentini fyri hesum hava í høvuðsheitum verið, at talan er um eina so týdningarmikla uppgávu at skula rigga, at tað er altavgerandi, at mann hevur fult álit á, at veitarin megnar at lyfta uppgávuna – eisini hóast kostnaðurin møguliga gerst nakað hægri. Hartil kemur, at Elektron frammanundan kennir ta uppgávuna og hevur fólk, sum hava arbeitt við hesum í nógv ár. Í høvuðsheitum hava allir hoyringarpartar tikið undir við hesum, tó at spurnartekin hevur verið sett við, um ikki onkur onnur fyritøka í Føroyum hevði megnað at lyft uppgávuna.

3. TAKS hevur undir hoyringunum greitt frá, at tann parturin, sum hevur verið í útboði, er umleið helvtin av verkætlanini, og snýr seg um brúkaraflaturnar (front-end). Tað er upplýst, at talan var um eitt útboð í 2021, har 1-2 størv við ávísum førleikum og royndum vórðu boðin út fyri eitt styttri tíðarskeið. Tað er somuleiðis upplýst, at væntaða arbeiðið nú er 6-8 fólk í fleiri ár.

Undir hoyringunum og í hoyringarskrivum eru ivamál reist um, hvørt talan veruliga hevur verið um eitt rætt útboð í 2021, tá hetta útboðið at síggja til snúði seg um eina munandi minni uppgávu enn hana, sum nú skal fremjast.

TAKS hevur í fleiri umførum greitt frá, at tað eftir teirra meting hevur verið talan um rættar mannagongdir og eitt rættvíst útboð. Hetta hevur verið stuðlað av, at TAKS sigur seg hava kunnað allar partar um, at útboðið í 2021 snúði seg um nakað væl meira enn tað, sum stóð í útboðstilfarinum, og at hetta eisini partvíst er lýst í útboðstilfarinum. Meirilutin metir ikki, at tað hevur verið skjalfest fyri Fíggjarnevndini nakrantíð fyri tíðarskeiðið 2021 til í dag, at hetta hevur verið støðan, og meirilutin undrast undir øllum umstøðum stórliga á, at eitt útboð verður framt í 2021, har tað ikki er heilt greitt, hvussu umfatandi uppgávan er. Til dømis verður í miðal 100 tímar um mánaðin nevnt í útboðstilfarinum, meðan uppgávan í dag er nógvir 100 tímar um mánaðin.

Fíggjarmálaráðið hevur eftir samskifti við Fíggjarnevndina upplýst, at ráðið nú hevur í hyggju saman við TAKS at gera eina meting av, um tað er skilagott at gera eitt nýtt útboð av rammuavtalu um "OutSystems" (front-end partin). Meirilutin tekur til eftirtektar, at henda nýggja meting fer at verða gjørd.

Meirilutin heitir hartil á landsstýrið um at tryggja, at ivamál sum hesi ikki stinga seg upp í komandi KT-verkætlanum hjá landinum. Ein partur av hesum er at tryggja, at risa KT-verkætlanir ikki byrja í smáum inni á stovnum, men verða samskipaðar í samráð við politiska myndugleikan, so tær eru partur av løgukarminum, áðrenn tær fara í gongd.

Meirilutin staðfestir, at tað er álitið á leiðslurnar í TAKS og í Fíggjarmálaráðnum, sum hevur við sær, at meirilutin kann mæla Løgtinginum til at taka undir við hesum uppskotinum til eina íløgu fyri ímillum 100 og 150 mió. kr. Meirilutin heldur, at landsstýriskvinnan eigur at halda ein kunningarfund fyri løgtingslimum, tá støða er tikin til spurningin um møguligt nýtt útboð, umframt so skjótt onkur av teimum 35 verkætlanunum annaðhvørt er komin á mál við røttum innihaldi, prísi og tíðarætlan, ella um tað eru tekin um, at nakar av pørtunum í verkætlanini ikki gongur sum ætlað.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Upplýst er, at gamla kt-skipanin hjá TAKS eigur at nútímansgerast og framtíðartryggjast, og TAKS hevur boðað frá, at tað er bráðneyðugt, at farið verður í gongd við at gera hetta arbeiðið. Hesar kt-skipanir eru grundarlagið fyri meginpartin av inntøkunum hjá Landskassanum. Kt-skipanin er frá 1984, og síðani tá er bygt uppá hesa skipan, soleiðis at talan er samanlagt um eina sera stóra og fløkjasliga skipan, sum er ment í gamlari tøkni. Nevndini er eisini upplýst, at ætlanin er at seta í verk 35 verkætlanir. Hesar 35 verkætlanirnar verða so býttar á fýra parallellar menningarleiðir, sum síðani verða raðfestar av leiðsluni hjá TAKS út frá eini meting um, hvat gevur TAKS og føroyska samfelagnum mest virði.

Eingin ivi skal vera um, at minnilutin sær tað bæði týdningarmikið og neyðugt at fáa nútímansgjørt og framtíðartryggjað nevnda kt-undirstøðukervi. Men tá tað er sagt, metir minnilutin ikki, at lógaruppskotið er nóg góð trygd fyri, at komið verður á mál við hesi stóru ætlan, og tá um kostnaðin ræður, so er óvissan sera stór. Óvissan er bara ov stór.

Minnilutin heldur, at kostnaðurin ber við sær eina sera stóra óvissu. Heildarætlanin verður mett at kosta umleið 100 mió. kr. í 2022 prísum. Fyri at taka hædd fyri príshækkingum, óvissu og óvæntaðum meirkostnaði verður lagt upp fyri einum meirkostnaði á 50% omaná samlaðu kostnaðarætlanina, og tí er samlaði prísurin í uppskotinum komin upp á 150 mió. kr. Verkætlanin er ætlað at ganga yvir fimm ár. Í hesi fimm árini verður mett, at príshækkingin tilsamans verður knappar 20 mió. kr., meðan óvissan og meirkostnaður verður mettur til góðar 30 mió. kr. Við so stórari verkætlan og stórari játtan verður váðin í verkætlani stórur.

Hoyringarskriv og hoyringin í nevndini hevur sett ljós á hetta við útboði og rætta kostnaði.

Minnilutin kann partvís skilja, at tað kann verða avbjóðandi at bjóða ”back–end” partin av skipanini út, men tað, sum verður nevnt ”front-end” parturin (brúkaraflatan) av skipanini eigur avgjørt at verða bjóðað út. Hesin kostnaðurin verður mettur til 50 mió. kr. umframt príshækkingar, óvissu og meirkostnað. Tá sagt verður í lógaruppskotinum, at veitari er valdur út frá útboði í 2021, so er tað rætt, at útboð var í 2021. Tað útboðið fevndi um 100 tímar um mánaðin í eitt avmarkað tíðarskeið, meðan nú snýr arbeiðið seg um fleiri 10-túsund tímar. Hetta átti tí avgjørt at verið boðið út av nýggjum, bæði fyri at fáa fleiri veitarar at bjóða seg fram og fyri at fáa tann rætta prísin.

Minnilutin heldur eisini, at í staðin fyri at bjóða alt út í einum, átti henda sera stóra verkætlan - sum inniheldur 35 smærri verkætlanir - heldur at verið býtt sundur í smærri tyssi, sum so kundu verið boðin út.

Í uppskotinum stendur eisini, at ein partur av heildarætlanini, sum ikki er viðgjørdur enn, er, hvørt tann parturin, sum kallast bókhaldsskipanin, skal nútímansgerast á sama hátt sum restin av toll- og skattaskipanini ella ikki. Her kann tað vísa seg, at tað er skilabetri at velja eina standardskipan til áognarstýring. Um avgjørt verður at brúka eina standardskipan, so verður tann parturin eisini boðin út.

At ein partur av heildarætlanini ikki er viðgjørdur enn, metir minnilutin vera eina ábending um, at verkætlanin ikki er nóg væl fyrireikað ella ikki nóg nógv fyrireikað.

Eitt, sum eisini er óvist, er, hvørt fígging verður tøk til hesa stóru verkætlan. Nógvar stórar verkætlanir eru á skrá – tunlar, kt-verkætlanir, kampus, tjóðleikhús, ferjur o.s.fr., men eingin langtíðarløguætlan fyriliggur. Tí er óvist, um peningur verður tøkur til endamálið, og hvar á raðfestingarlistanum hetta liggur. Alneyðugt er tí at fáa langtíðarløguætlanina fram í ljósið, tí áðrenn vit vita neyvt um hana, so gevur tað ikki meining at samtykkja eina so stóra og dýra verkætlan.

Minnilutin mælir tí landsstýrinum til at fyrireika hesa verkætlan betur, m.a. vísandi til tað, sum nevnt er omanfyri.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 15. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	